Ólógligar rakettir

Hernaðarfrøðingar halda, at irakar hava rakettir, sum bera longri enn 150 kilometrar. Er hetta so, er tað brot á ST-samtyktirnar, sum banna Irak at hava rakettir, sum bera longri enn 150 kilometrar.

Bretsk bløð skriva frá hernaðarserfrøðingunum, sum hava hjálpt vápnaeftirlitsmonnunum hjá ST, at onkrar rakettir, sum eftirlitsmenninir hava funnið, bera 183 kilometrar og eru tískil ólógligar. Enn er kortini ikki greitt, hvussu stóran dent Hans Blix fer at leggja á hetta, tá hann fer at kunna ST-trygdarráðið um kanningarnar hjá eftirlitsmonnunum.

Sambært The Guardian vóru tað hernaðarserfrøðingar úr USA, Bretlandi og Ukraina, sum hjálptu vápnaeftirlitsmonnunum við rakettunum. Russland varð boðið at senda ein serfrøðing til kanningarnar, men tók ikki av tilboðnum, skrivar blaðið.

Brot á fólkarættin

Leypa amerikanarar á Irak, er tað brot á fólkarættin, sigur Richard Goldstone, ið verður mettur sum ein tann fremsti serfrøðingurin í altjóða revsirætti.

Sambært Richard Goldstone, sum millum annað hevur verið formaður í altjóða krígsbrotsmannadómstólinum í Haag, kann eitt land ikki leypa á eitt annað land, uttan at talan er um sjálvverju, ella at ST-trygdarráðið hevur góðkent tað. Sjálvur sigur hann seg ikki hava sæð nakað, sum prógvar, at Irak hóttir USA.

- Tí er eingin ivi um, at eitt amerikanskt álop á Irak hevði verið brot á ST-viðtøkurnar, segði Richard Goldstein, sum er suðurafrikani, í amrøðu við eina avstralska útvarpsstøð.

Vilja hava samband við Castro

Meiri enn helmingurin av teimum kubanunum, sum búgva í USA, vilja hava betri samband við stýrið hjá Fidel Castro á Kuba. Tað vísir ein meiningakanning hjá blaðnum Miami Herald.

Kanningin varð gjørd, beint eftir at umboð frá teir útlagnu kubanararnar høvdu havt fund við kubanska sendimannin í USA, Dagoberto Rodriguez. Endamálið við fundinum var at skipa fyri einari ráðstevnu um viðurskiftini millum teir útlagnu kubanararnar og myndugleikarnar á Kuba.

Sambært kanningini hjá Miami Herald taka 56 prosent av kubanunum í USA undir við betri sambandi við stýrið hjá Castro. Kanningin vísir, at hugsunarhátturin er nógv broyttur, tí fyri tíggju árum síðani tóku bert 36 prosent av kubanunum í USA undir við betri sambandi við myndugleikarnar í Havana.

Banna vatn og vín

Nakrir amerikanskir kongresslimir eru so argir inn á amerikansku mótstøðuna ímóti Irak-krígnum, at teir hótta við at leggja fram uppskot um at steðga øllum innflutningi av vatni og víni úr Fraklandi.

The Washington Post skrivar, at republikanski framsøgumaðurin í umboðsmannatinginum, Dennis Hastert, er fremsti talsmaðurin fyri at banna øllum fronskum vatni og víni. Samstundis eru aðrir farnir undir eina herferð, sum hevur til endamáls at fáa fólk at keypa annað vín heldur enn franskt. Eitt nú verður sagt, at fronsku vínbóndurnir koyra oksablóð í reyðvínið fyri at fáa tað klárari. Hetta hevur vakt ans í USA, tí samstundis minna politikararnar fólkið á, hvussu neytaoðin gjørdi um seg í fleiri londum í Evropa í fjør.

Amerikanarar keypa nógv drekkivarn í fløskum úr Fraklandi. Í fjør var hesin innflutningurin næstan 150 milliónir krónur.

UTTAN ÚR HEIMI

Hóttir við at leypa á USA

Norðurkoreanar vísa í hesum døgum, at teir fyrr hava vunnið amerikanarunum neisur. Hendan myndin er tikin umborð á amerikanska njósnaraskipinum "Pueblo", sum norðurkoreanar tóku í 1968. Manningin, sum taldi 83 mans, varð hildin aftur, til USA ellivu mánaðir seinni bað um umbering fyri at hava njósnast ímóti landinum

Norðurkoreanska uttanríkisráðið sigur nú beinleiðis, at landið kann gera av at leypa á USA. Samstundis ávarar CIA um, at Norðurkorea hevur rakettir, sum kunnu raka mál í Kalifornia

KRÍGSHÓTTAN
Árni Joensen:

Talsmaðurin hjá norðurkoreanska uttanríkisráðnum, Ri Kwang-hyok, legði ikki fingrarnar ímillum, tá hann gjáramorgunin varð spurdur um viðurskiftini millum Norðurkorea og USA.

- Vit eru førir fyri at raka amerikansk mál um allan heimin, og vit fara ikki at drála, gera amerikanarar tað minsta, sum kann eggja okkum til at leypa á. Okkara álopsevni eru óavmarkað. Vit kunnu raka teir allastaðni, segði Ri Kwang-hyok.

Hann legði afturat, at tað slepst ikki undan, at grannalondini hjá Norðurkorea verða drigin upp í eitt møguligt kríggj millum Norðurkorea og USA.

Alment hava amerikansku politikararnir ikki gjørt nógv burtur úr norðurkoreansku hóttanini, men seinastu tíðina eru loftverju- og radarstøðir settar upp í Washington, og tyrlur og jagaraflogfør eru støðugt á flogi til tess at halda eygað við loftrúminum, skriva amerikanskir fjølmiðlar.

CIA ávarar

Samstundis ávarar amerikanska fregnartænastan, CIA, amerikanarar um, at Norðurkorea hevur rakettir, sum kunnu raka mál á amerikansku vesturstrondini. Stjórin í CIA, George Tenet, segði í einari hoyring í Senatinum fyrradagin, at hann er sannførður um, at norðurkoreanar hava rakettir, sum bera so langt, at tær kunnu raka mál í sjálvum USA.

Einstakir amerikanskir embætismenn hava nevnt hetta fyrr, men George Tenet er tann mest týðandi embætismaðurin, sum beinleiðis hevur sagt, at Norðurkorea kann raka mál í USA.

Undir hoyringini vísti George Tenet á eina frágreiðing, sum CIA skrivaði í 2001. Har stóð, at norðurkoreanar hava eitt slag av rakettum, sum teir nevna Taepo Dong-2, og at hesar rakettirnar bera so langt, at tær lættliga kunnu raka mál á Hawai, í Alaska og á amerikansku vesturstrondini. Undir hoyringini segði Tenet eisini, at tað er ikki óhugsandi, at Norðurkorea hevur nóg mikið av plutonium til tvær kjarnorkubumbur.

Altjóða kjarnorkustovnurin, IAEA, hevur biðið ST loysa ósemjuna, sum hevur tikið seg upp, eftir at Norðurkorea hevur tikið sína kjarnorkuverkætlan uppaftur, men í gjár boðaði kinesiska stjórnin frá, athon er ímóti, at ST leggur seg út í málið.

Kinesiski ST-sendiharrin, Zhang Yan, segði í New York í gjár, at møgulig ST-tiltøk ímóti Norðurkorea fara bara at gera støðuna uppaftur verri. Hann helt, at málið er nóg álvarssamt, sum tað er.

Russland fer kanska at nýta sýtingarrættin

Russiski forsetin, Vladimir Putin, sigur, at Russland fer kanska at nýta sýtingarrættin, tá ST-trygdarráðið fer at viðgera Irak-málið aftur.

IRAK-KREPPAN
Árni Joensen:

- Russland hevur ofta nýtt sýtingarrættin fyrr, og er tað neyðugt, fara vit at nýta hann eina ferð afturat, segði Putin, tá hann endaði vitjan sína í Fraklandi.

Putin legði afturat, at russiska stjórnin hevur somu støðu sum stjórnirnar í Fraklandi og Týsklandi til Irak-málið. Tað merkir, at russar taka undir við, at vápnaeftirlitsmenninir eiga at fáa betri stundir til at leita eftir møguligum ólógligum vápnum í Irak.

Russiski forsetin ásannaði, at tað fer at ávirka viðurskiftini millum Russland og einstøk onnur lond, ger landið av at nýta sýtingarrættin, men tað mugu vit so taka við, legði hann afturat.

London kann fáa sín 11. september

Alvápnaðir hermenn á varðhaldi við Heathrow-floghavnina skulu tryggja, at London ikki fær sín 11. september. Fólk verða steðgað, og bilar kannaðir, tí her sleppur tilvildin ikki at ráða

Yvirgtangsserfrøðingar vænta, at yvirgangsmenn ætla at skjóta eina rakett eftir einum ferðamannaflogfari við Heathrow-floghavnina í London. Løgreglan biður fólk um hjálp

YVIRGANGUR
Árni Joensen:

Síðani týsmorgunin hava umleið 1.000 løgreglumenn og einir 450 hermenn við stríðsvognum, 30 millimetra kanónum og maskinbyrsum staðið á varðhaldi í og við Heathrow-floghavnina í London alt samdøgrið. Hermenn í stríðsbúna og við sjálvvirkandi vápnum ganga aftur og fram í móttøku- og fráferðarhallunum og úti á sjálvum flogvøllinum.

Orsøkin til tað sera stranga eftirlitið er, at løgreglan, Scotland Yard, hevur fingið eina hóttan um yvirgang. Sambært blaðnum The Independent er tað felagsskapurin al-Qaeda ella ein felagsskapur, sum líkist honum, ið fyrireikar seg til at søkja at einum stórum máli í sambandi við, at tann muslimska hátíðin Eid endar í morgin.

- Hóttanin ímóti Bretlandi er líka álvarssom sum atsóknin at USA tann 11. september í 2001, segði formaðurin í stjórnarflokkinum Labour, John Reid, við sjónvarpið Sky fyrradagin.

Hann kom við sínari ávaring stutt eftir, at David Blunkett, innanríkisráðharri hevði sagt seg vóna, at Bretland fór at sleppa undan einari yvirgangsatsókn teir næstu dagarnar.

Spurdur, um trygdartiltøkini ikki vóru í so umfatandi, svaraði John Reid:

- Tey, sum halda, at hóttanin bara er ein partur av einum leiki, vita ikki, hvat tey tosa um.

Rakettálop

Scotland Yard hevur sýtt fyri at avdúka, hvat slag av hóttan talan er um, men serfrøðingar í yvirgangi halda, at talan helst er um eitt rakettálop á eitt flogfar, eins og al-Qaeda skipaði fyri í Mombasa í Kenya herfyri.

- Uppgávan er at tryggja økið kring Heathrow-floghavnina. Vit kunnu fylla alla floghavnina við nútímans trygdartøkni, løgreglumonnum og hermonnum, men tær nýtist ikki at vera nakar Einstein fyri at seta ein bil tætt uttan fyri floghavnina og at skjóta eina rakett haðani, sigur Chris Yates, sum starvast hjá viðurkenda Jane's Airport Review, við The Independent.

Kanna alt

Løgregluovastin í London, John Stevens, roynir at sissa fólk, men hann leggur kortini afturat, at fólk eiga at hava eygu og oyru opin og at gera vart við seg, varnast tey nakað óvanligt.

Síðani týsmorgunin hava løgreglumenn og hermenn steðgað øllum bilum nærhendis Heathrow-floghavnini. Fólk skulu upplýsa, hvørji tey eru, hvørji ørindi tey hava, og bilarnir verða eisini kannaðir.

Í Windsor, sum er tætt uttan fyri floghavnina, ganga hermenn í gøtunum, og allar viðalundir eru væl og virðiliga kannaðar. Í lítlu bygdini Wraysbury tætt við floghavnina eru hermenn at síggja í gøtunum, og í miðbýnum í sjálvum London eru eisini munandi fleiri løgreglumenn at síggja, enn vanligt er.

Tað er heldur ikki bara í London, at eftirlitið er styrkt. Í floghavnini í Manchester eru eisini nógvir løgreglumenn á varðhaldi. Løgregluovastin í býnum, Martin Gaffrey, segði við tíðindastovuna AP í gjár, at tey øktu trygdartiltøkini eru ætlað at vísa fólki, at myndugleikarnir gera alt, sum gerast kann til tess at tryggja, at tey kunnu ferðast uttan at óttast nakað.

Blair gav boðini

Muslimarnir í Bretlandi eru í øðini inn á tað umfatandi eftirlitið, og teir halda tað vera niðursetandi, at myndugleikarnir seta eina møguliga yvirgangsatsókn í samband við muslimsku hátíðina Eid.

- Hetta er tað sama sum at siga, at tey kristnu fara at nýta jólini til at bumba jødisk, muslimsk ella buddhistisk trúarsamfeløg. Hetta er heilt burturvið, sigur Massoud Shadjareh, sum er formaður í islamsku mannarættindanevndini í London við The Independent.

Tað var Tony Blair, forsætisráðharri, sum gav myndugleikunum boð um at herða trygdartiltøkini í Heathrow-floghavnini. Tað váttaði ein talsmaður fyri Downing Street mikudagin. Talsmaðurin segði, at stjórnin og trygdarløgreglan gera alt, sum gerast kann til tess at verja fólkið.